


### Sámal á Krákusteini:

# Okkara kendasti politistur

**Sámal á Krákusteini er eitt sera kent navn í Havn, hóast tað eru nærum 80 ár síðani, hann doyði. Men Sámal hevur gjørt seg ódeyðiligan við síni skriving, sum í 2008 kom út í bókini Memoirer og Autobiografi. Umframt hetta er framvegis eitt "livandi" minni um Sámal. Hetta er nevniliga hansara vakri gravsteinur í gamla kirkjugarði**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Sámal var føddur í 1852. Foreldrini hjá honum vóru Daniel Fr. Samuelsen, timburmaður, og Lorenze Jacobsdatter. Tey giftust 13. november 1851. Vit vita so ein gest, sum var í brúdleypinum. Hetta var Elsebeth Kristina Evensen, sum seinni giftist við handilsforvaltaranum Christoffer Michael Olsen, fyrr umrøddur í hesi røð.

Dánjal og Lorense búðu nærindis Skansanum. Tí-skil kom Sámal frá barnsbeini av at uppliva lívið á Skansanum, har pápi hansara eisini starvaðist. Harvið skaptist tann áhugi, sum skuldi gerast hansara lívsstarv.

Sámal fekk undirvísing heima til hann varð 9 ár. Síðan gjørdist hann ein av fyrstu næmingunum í realskúlanum.

Sámal varð konfirmeraður inni á Nesi av V.U. Hammershaimb, tí tað var eingin prestur í Havn veturin 1866-67. Yvirlærarin á realskúlanum, Bojsen, sum í 1867 flutti til Danmarkar, bjóðaði sær at taka Sámal við sær niður og seta hann í læru. Sjálvur hevði Sámal besta hug til at lesa, men hetta segði pápin nei til. Tað var heldur ikki ráð til tað. Hann vildi eisini hava sonin at fáa sama starv sum hann sjálvur.

Sámal fór niður og arbeiddi sum snikkari. Hann nýtti samstundis høvið at síggja seg um í Danmark.

Sámal gjørdist sjúkur av skarlaksfepur og fór við tungum huga heim aftur í 1868. Tá var læraraskúli byrjaður í Havn, og Sámal vónaði at kunna gerast lærari. Hann var stuðlaður av sovæl presti sum amtmanni, men pápin segði nei.

Hann vildi hava sonin at taka við starvinum sum politistur ella jekari, sum tað kallaðist. Samstundis lovaði hann pápanum at vera hjá mammuni, tá ið hann sjálvur doyði. Tað var eingin annar til tess, tí Sámal var einabarn. Tí mátti hann eisini siga nei, táið hann seinni aftur fekk í boði at fara til Danmarkar.

Hetta endaði so við, at Sámal 21 ára gamal fekk starv við politiið tann 1. oktober 1873, og 1.apríl 1886 varð hann útnevndur til kvartermeistara. Hetta starv hevði hann inntil hetta starv varð avtikið í 1902. Tá fekk hann heitið "politibetjent for Færø Amt." Í 1922 fall Sámal fyri aldursmarkinum.



*Húsini á Krákusteini*



*Margrethe var næstelst av børnunum hjá Susannu og Sámal*

**Slagsmál á Doktaragrund í 1899**

Petur Alberg hevði í síni dagbók áhugaverdar og stuttligar frásagnir um hendingar, har Sámal eisini var við í. Henda er frá 22. juni 1899:

I Aften Kl. 10 var der Slagsmaal nede paa Doktorgrund, hvor nogle Grimsbyere fra Sluppen Presto var fulde og sloges indbyrdes. 3 blev arresterede, hvoraf den ene maatte bindes. Den sidstnævnte gik ganske rolig mellem to Politister, Kvartermester S. F. Samuelsen og Menig Daniel Midjord. Pludselig slog han sig løs og løb fra dem baglæns, men kun et lille Stykke. Politisterne løb efter ham, men han rettede saa kraftige Slag mod Kvartermesteren, at denne ikke kunde komme til ham. Medens han saaledes stod og boksede med Kvartermesteren, kom Augustinus Hansen gaaende nede efter. Saa raabte Kvartermesteren til ham og bad ham tage Grimsbyeren bagfra. Augustinus tog da og smed ham ned paa Gaden, hvor han blev holdt, til Kvartermesteren kom med Baand at binde ham med. Saa blev Grimsbyeren sammen med to af sine Kammerater sat i Arresten. Den ene af de to andre slap nok med en Pengebøde. Men denne, Boxeren, er nu til Forhør i Dag og faar vist en god straf, da han har slaaet Kvartermesteren.



*F.v. Lorenze, Sámal, Anthon, Susanna og Helene*



*FRED*

*SAMUEL F. SAMUELSEN*
*DBMD FM*
*F. 23. JULI 1852*
*D. 3. MARTS 1932*

*OG HUSTRU*

*SUSANNE J.F. SAMUELSEN*
*FØDT NIELSEN*
*F. 26. DECEMBER 1856*
*D. 21. MAJ 1937*

*OG SØN*

*DANIEL F.S. KRAGESTEEN*
*F. 17. JULI 1881*
*D. 2. MAJ 1884*



*Sámal á Skansanum*

**Áhugaverdar endurminningar**

Bókin hjá Sámali er sera áhugaverd. Her umrøður hann allar tær stóru hendingar í Havn í hansara nærum 80 ára langa lívi.

Sum rímiligt er, so skrivar hann nógv um sítt arbeiði, millum annað um tær ferðirnar hann fór til Danmarkar við fangum, sum fóru niður at sita.

Umframt hesa bók hevði hann eina stóra grein í Dimmalætting fyrst í 1928 um søguna hjá Havnar Skansa.

Men Sámal hevði eisini áhugamál. Hann var virkin í Meinigheitshúsinun í Havn, har hann var nevndarlimur. Hesir skiftust um at hava ábyrgdina eina viku í senn.

Sámal var ikki bara trúgvur í sínum skifti, men hann tók eisini ofta skiftini, sum aðrir skuldu hava. Viðhvørt las hann lestur, men oftast talaði hann um eitthvørt uppbyggiligt evni.

Ikki sjáldan var hann noyddur at koma á fundin beinleiðis úr arbeiði sunnudagar. Hann hongdi tá politifrakka og húgvu í gongina í Meinigheitshúsinum, fór so inn at halda fyrilestur ella lesa lestur, og so aftur í tænastubúnan til arbeiðis.

Frá 1890 til 1914 var Sámal ofta avloysari sum kirkjutænari, klokkari og deknur.

Sámal var eisini ein av innkallarunum til jólafundin í 1888.

**Tá ið Sámal fylti 70 ár skrivaði Dimmalætting:**

S.F. Samuelsen er almindelig afholdt og har mange Venner ikke alene her i Thorshavn men overalt paa Færøerne. Endskønt han nu er naaet Støvets Aar, er han endnu rask og rørig som faa, jovial, elskværdig paa alle omraader hvad enten det gælder Fortid eller Nutid, og det er en Fornøjelse at tale med ham.

Hr. Samuelsen er benaadet med Dannebrogsmændenes Hæderstegn og fik under Kongebesøget i Fjor af Hans Majestæt overrakt Erindringsmedaljen i Guld.

S.F. Samuelsen har i alt været ansat i Politijenesten i c. 49 Aar. Dette har været en enestaende lang og sikkert ogsaa anstrængende og besværlig Arbejdsdag, hvorefter Hvilen er velfortjent. Med ønsket om, at Livets Aften maa blive lys og lykkelig og maa forme sig som en rolig og fredfuld Hvilestund for den aldrende Hædersmand, vil vi afslutte disse linjer.

**Kona og børn**

Sámal var giftur við Susanne J.F. Nielsen (1856-1937). Hon var ættað úr Saltangará og kom 20 ára gomul til Havnar at tæna hjá grannanum, umrødda Christoffer M. Olsen.

Tey bæði fingu børnini Daniel (1881-84), Johanne Margrethe (1883-1919), Niels (1887-1958, Hjalmar (1889-1961) Anton (1892-1956) Helene (1896-1976) og Lorentze (1896-1980.) Øll børnini blivu doypt Kragesteen eftir staðarnavninum, har tey búðu.

**Í komandi parti** verður greitt frá versoni Sámal, sum var millum teir fyrstu, sum fingu bil í Føroyum, og sum doyði av eini spreingivanlukku á nýggja hospitalinum í 1924